## Aftur møguleiki fyri meti

Fyri 14 døgum síðani kundi ein heppin vinnari hjá Danske Spil seta met, tá møguleiki var at vinna 58 milliónir. Aftur í kvøld er møguleikin, hesaferð at vinna 61 milliónir. Í kvøld ber til at skriva seg inn í søgubøkurnar, um tú sum hin einasti fær fatur í øllum vinninginum hjá Danske Spil í mikudagslotto. Eingin vinnari var til dráttin seinasta mikudag, og tað merkir, at vanligi vinningurin í kvøld er 13 milliónir krónur. Hartil kemur so supervinningurin, sum nú er komin heilt upp á 48 milliónir krónur. Tað merkir so, at um alt lagar seg, kann ein einstakur vinnari fara avstað við heilum 61 milliónum krónum. Metið higartil er 38,5 milliónir krónur, sum ein familja í Keypmannahavn vann í mars 2008. Superpuljan er ikki vunnin síðani 21. oktober í fjør



# Skipskirkjugarður í Vestmanna gevur kommuni inntøkur

**Undir kreppuni fyrst í nítiárunum lógu nógv skip á Vestmanna, sum fíggingarstovnar høvdu lagt. Nú kreppa aftur hevur verið og er í pørtum av vinnuni, eru skipini aftur vorðin fleiri, sum eru løgd í Vestmanna**

KREPPA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

"Vestmanna verður vanliga hildin at vera tryggasta akkersplássið í Føroyum. Kendi rithøvundurin, J. Chr. Svabo, metti longu fyri 200 árum síðani, at Vestmanna avgjørt er besta akkerspláss, bæði á sumri eins væl og gjøgnum harðbalna, norðuratlantiska veturin..."

Soleiðis skrivar Vestmanna kommuna á síni heimasíðu um Vestmanna sum skipahavn.

Í síðstu viku sleipaði vaktarskipið Tjaldrið línuskipini West Freezer og Venus úr Vágum til Vestmanna.

West Freezer er fyrrverandi Pison, sum í fleiri ár var heimahoyrandi í Klaksvík.

Venus er fyrrverandi Ekliptika, sum tá var heimahoyrandi í Klaksvík. Upprunaliga er hetta er norskur línubátur, sum fleiri føroyingar kenna undir navninum Øyliner.

Fiskiveiðieftirlitið sigur, at tað er Føroya Banki, sum hevur biðið um sleipini.

Feløgini, sum eiga West Freezer og Venus, eru í fíggjarligum trupulleikum, og væntandi er, at skipini koma at liggja í Vestmanna, til tey hava fingið nýggjar eigarar.

Tað er partafelagið Fossá í Sandavági, ið hevur staðið sum eigari av Venusi, og tað er smápartafelagið KG 476 í Miðvági, ið hevur staðið sum eigari av West Freezer.

Á Fiskiveiðieftirlitinum verður sagt, at tað er ikki ofta, at vaktarskip gera sleip fyri bankar sum í hesum førinum, tí vanligt er, at skipini verða sigld upp á pláss, um tey annars eru í lagi.

### Rinda havnargjald

Sosialurin hevur spurt havnarstjóran í Vestmanna, Leiv Olsen, um skip, sum fíggingarstovnar soleiðis leggja hald á, eru ein inntøka fyri kommununa fyri tað havnagjald, tey rinda, meðan tey liggja.

Leivur Olsen sigur, at nú West Freezer og Venus liggja í Vestmanna, ræður Føroya Banki yvir tilsamans fýra skipum og trolbátum, sum liggja við bryggju í Vestmanna.

Umframt línuskipini, sum komu í síðstu viku, eru trolbátarnir Niclas og Vesturfarið eisini lagdir í Vestmanna. Haraftrat er ein glastrevjabátur, sum bankin eisini hevur fingið lyklarnar til.

Havnarstjórin sigur, at skip, sum liggja við bryggju í Vestmanna, gjalda 1 krónu og 45 oyru um samdøgrið fyri hvørt nettotons, sum tey eru stór.

- Taka vit eitt skip sum línuskipið West Freezer, er nettotonsatalið 120. Tað merkir, at bankin noyðist at gjalda 174 krónur um samdøgnið í havnagjaldi fyri at hava skipið liggjandi á Vestmanna, sigur hann.

### Størri skip fyrr

Havnarstjórin vísir á, at undir kreppuni fyrst í nítiárunum fekk kommunan rímiliga nógv inn í havnagjøldum, tí fleiri stór skip, sum fíggingarstovnar høvdu lagt hald á, tá lógu á Vestmanna.

Leivur Olsen sigur annars, at færri skip koma á Vestmanna í dag enn í sínari tíð, tá avskipingar eisini vóru um byggjukantin.

- Men enn verður fiskur landaður í Vestmanna, og tí liggja ísfiskatrolarar javnan við bryggju, sigur havnarstjórin í Vestmanna.



*Innari liggur línuskipið West Freezer og ytri línubáturin Venus. Tað er Føroya Banki, sum nú hevur lyklarnar til skipini*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*



*- Sum tjóð eiga Føroyar at halda seg langt burtur frá trælahaldi, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Jan Højgaard í stríði við ræk

**Føroya Fiskimannafelag liggur í einum eftir øllum at døma drúgvum rættarmáli við reiðaríið, sum eigur rækjutrolaran, Arctic Viking**

STRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard, er ikki so skakkur av, at rækjutrolarin Fríðborg nú er seldur. Hann sigur, at hetta var væntandi, tí sum hann hevur skilt, er skipið dýrt í rakstri, og trupult hevur verið hjá felagnum, sum eigur skipið, at fáa endarnar at røkka.

Einir 27 mans tilsamans hava verið knýttir at Fríðborg, men Jan Højgaard heldur, at hesir menn kortini høvdu mist sína hýru - antin fyrr ella seinni, soleiðis sum gongdin hevur verið.

Sjálvur hevur Jan Højgaard sum formaður í Fiskimannafelagnum leingi fýlst á, at útlendingar umborð á føroyskum rækjuskipi ikki hava siglt undir somu treytum sum føroyskir fiskimenn.

- Vit hava tapt rættarmál í Føroya rætti móti felagnum, sum eigur rækjutrolaran Arctic Viking. Hóast tað, at vit ikki fingu viðhald, hava vit valt at royna málið í Eystara Landsrætti.

Hann sigur, at málið millum Fiskimannafelagið og felagið, sum eigur Arctic Viking, kemur fyri aftur hin 23. mars.

- Hetta er eitt mál, sum ikki bara viðkemur limunum hjá okkum, men føroysku arbeiðarafjøldini í síni heild. Tað eigur ikki at lata seg gera at hava útlendingar umborð á før-